## 300 kilometrar um tíman í sandroki og brennandi hita

Hitastigini eru nógv í Bahrain og hetta setur stór krøv til bæðir koyrarar, bilar og dekk. Eisini fýkur javnan sandur inn á breytina. Hetta er enn ein avbjóðing til motorarnar. Allir bilarnir uttan tann hjá Michael Schumacher hava fingið nýggjan motor til hesa koyringina, og hetta kann sjálvandi verða ein trupulleiki hjá heimsmeistaranum.

Renault, sum hava vunnið tvær tær fyrstu koyringarnar sannførandi, skuldu havt góðar møguleikar at gjørt seg galdandi aftur. Men eisini Toyota og BMW/Williams sum kláraðu seg væl í Malaysia eru góð boð uppá vinnarar.

McLaren/Mercedes hesaferð við Kimi Räikkönen og Pedro de la Rosa, settu skjótastu umferðina í Malaysia, og bert ein punktering forðaði Räikkönen í at enda longuri frammi í Malaysia.

Red Bull við David Coulthard og Christian Klien eru einasta liðið sum er endað í stiginum við báðum bilum í báðum koyringum, og koma til Bahrain við fleiri aerodynamiskum framstigum, serliga Coulthard tykist sum endurføddur, og eigur at verða tikin sum fyri fult.

Formel 1 árið tykist at gerast tað mest spennandi í nógv ár.

-NuD

## Montoya ikki við í Bahrain

Kolumbianski McLaren/Mercedes koyrarin Juan Pablo Montoya er ikki við, tá koyrt verður sunnudagin. Hann hevur brotið økslina meðan hann spældi tennis. Í hansara bili koyrir í staðin tann eini royndarkoyrarin hjá liðnum spaniumaðurin Pedro de la Rosa.

Brotið í økslini hjá Montoya er ikki so umfatandi, so væntandi fær hann luttikið í koyringini á Immolabreytini í Italiu um góðar tvær vikur. Støða verður tó ikki tikin til hetta fyrr enn í vikuni áðrenn Immola. Tá verður eisini avgjørt um ein møguligar avloysari skal verða de la Rosa ella hin royndarkoyrarin hjá liðnum eysturríkski Alexander Wurz.

-NuD

# Áðrenn Bahrain



**Tá formel 1 sirkusið hetta vikuskiftið vitjar kongaríkið Bahrain í Miðeystri, er hetta aðru ferð at koyrt verður á breytini. Bahrain er fyrsta landið í Miðeystri har kappast verur í formel 1**

FORMEL 1

*Niels Uni Dam*

Øll liðini hava síðan seinastu koyring, arbeitt hart fyri at gerast nóg kappingarfør, og sostatt avbjóða Renault, sum hevur vunnið tvær tær fyrstu koyringarnar.

Eisini dekkframleiðarnir kappast óført, og Bridgestone sum letur dekk til eitt nú Ferrari hevur nógv at prógva. Michelin liðini hava verið nógv betur higartil, og atfinningarnar móti Bridgestone hava verið lemjandi.

### FAKTA

**Um koyringina í Bahrain**
**Umferðir:** 57
**Breytarlongd:** 5,417 km
**Skjótast umferð:** Michael Schumacher(Ferrari), 1 m 30,252 s
**Longdin á koyringini:** 308.523
**Vinnari:** Michael Schumacher (2004)

*Kelda www.forix.com*

# Ferrari í nýggjum bili

**Í fjør vann Michael Schumacher fyri Ferrari, og liðfelagin Rubens Barrichello gjørdist næstur. Fá vænta at Ferrari megnar at endurtaka hetta úrslit**

FERRARI

*Niels Uni Dam*



*Ferrari fer at koyra í spildurnýggja F-2005, nú triðja umfar av Formel 1 kappingini fer av bakkastokki*

Ferrari koma til Sakhir breytina í Bahrain við einum spildurnýggjum bili. F-2005 eitur hann. Hetta er fyrsta koyringin at hesin bilur verður nýttur. Tí er sera ringt at siga nakað um kappingarførið, men spenningurin er stórur.

Ferrari eru byrjaðir kappingarárið í einum tillagaðum 2004 bili. Ætlanin var at bíða til koyringina í Immola um tvær vikur við nýggja bilinum, men orsakað av ringu úrslitinum higartil verður bilurin tikin í nýtslu nú.

Hóast Barrichello gjørdist nummar tvey í fyrstu koyringini í Avstralia, er kappingarárið 2005 ringasta árið hjá Ferrari, síðan Michael Schumacher kom til liðið í 1996. Barrichello kom ikki á mál í Malaysia, júst sum Schumacher í Avstralia, og sjeyndaplássið hjá Schumacher í Malaysia, var dekan ov aftarligt fyri ein heimsmeistara. Okkurt mátti gerast skuldi heimsmeistaraheiti ikki gleppa teimum av hendi.

Bæði Schumacher og Barrichello hava royndarkoyrt nýggja bilin seinastu vikurnar, og báðir siga hann vera eitt stórt framstig, og gleða seg til koyringina.

### Støður, Formel 1

**Koyrarar**

| Navn | Land | Merki | Stig |
|---|---|---|---|
| Fernando Alonso | Spania | Renault | 16 |
| Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 10 |
| Rubens Barrichello | Brasil | Ferrari | 8 |
| Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren | 8 |
| David Coulthard | Stórabretland | Red Bull | 8 |
| Jarno Trulli | Italia | Toyota | 8 |
| Nick Heidfeld | Týskland | Williams | 6 |
| Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 4 |
| Mark Webber | Australia | Williams | 4 |
| Christian Klein | Eysturríki | Red Bull | 3 |
| Michael Schumacher | Týskland | Ferrari | 2 |
| Kimi Raikkonen | Finnland | McLaren 1 | |

**Bilar**

| Merki | stig |
|---|---|
| Renault | 26 |
| Toyota | 12 |
| Red Bull | 11 |
| Ferrari | 10 |
| Wiliams | 10 |
| McLaren | 9 |